E-mail: sokomm@post.olivant.fo
Tlf. +298 332004 & 333122 Fax +298 332952

Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur



# Kunningarskriv 1998.

Verandi bygdaráðsskeið er komið í helvt, og nú árið 98 um skamma stund er komið á ársenda, fara vit at gera støðuna upp og sum frægast royna at kunna okkara borgarar.

Bygdaráðið hevur seinasta árið havt seytjan bygdaráðsfundir og viðgjørt umleið áttati mál av ymsum slag: byggiloyvir - sundurbýti - stuðlar - fíggjarmál - leigusáttmálar o. a.

Regluligu bygdaráðsfundirnir í árinum 1999 eru fastlagdir til hesar dagar:

| | |
|---|---|
| Týsdagin 26.01.99 | Hósdagin 25.02.99 |
| Hósdagin 18.03.99 | Mánadagin 19.04.99 |
| Mikudagin 26.05.99 | Mánadagin 21.06.99 |

| | |
|---|---|
| Mikudagin 01.09.99 | Týsdagin 05.10.99 |
| Mánadagin 15.11.99 | Týsdagin 14.12.99 |

Fíggjarætlanin fyri 1999. Á bygdaráðsfundi 26.11.98 var fíggjarætlanin hjá Sørvágs kommunu til 3. viðgerð og endaliga samtykt; somuleiðis er hon góðkend av Føroya Landsstýri. Skattaprosentið verður óbroytt 21, kirkjuskattaprosentið 0,25 og barnafrádrátturin verður 2500 kr. Eisini var samtykt at gjalda 2,5 milliónir í eykaavdráttum í 1999, sum verða býttir soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Banki | kr. | 575.579 |
| Føroya Sjóatrygging | kr. | 495.953 |
| Føroya Vanlukkutrygging | kr. | 32.591 |
| Føroya Lívstrygging | kr. | 261.215 |
| Føroya Brunatrygging | kr. | 1.783 |
| Kommunekredit | kr. | 8.107 |
| Nykredit | kr. | 1.124.773 |

Fíggjarætlanin fyri 1999 hjá Felagskommununi er kr. 167.000, harav kr. 60.000 verða nýttar av likviditetinum hjá Felagskommununi. Restin, kr. 107.000 verða býttar soleiðis, at helvtin verður deilt í mun til skattskyldugu inntøkuna fyri árið 1997, meðan hin helvtin verður býtt í mun til fólkatalið í kommununum 01.01.98. Samlaða býtið fyri 1999 verður: Sandavágs kommuna kr. 27.006,80 - Miðvágs kommuna kr. 38.102,70 - Sørvágs kommuna kr. 39.038,95 - Biggjar kommuna kr. 2.257,70 - Mykines kommuna kr. 593,85

Grannskoðaði roknskapurin fyri 1997 hjá Sørvágs kommunu var framlagdur og góðkendur á bygdaráðsfundi 21.10.98. Àrsroknskapurin vísir ein rakstur, sum javnvigar við kr. 20.202.999 og eini fíggjarstøðu, sum javnvigar við kr. 33.420.960. Í fíggjarætlanini fyri 1997 varð roknað við einum avlopi, áðrenn avdráttir uppá 3.142.000. Roknskapurin vísir eitt avlop uppá kr. 5.351.000. Avdráttir og rentir vóru samanlagt kr. 3.303.455.

Smábátaeigarar! Sum øllum kunnugt er oljutangi uppsettur í bátahylinum, og einaferð fyrst í januar 99 verður hesin sjálvtøkutangi klárur at taka í nýtslu, so tá kunnu bátaeigarar við korti, ið fæst frá Statoil, sjálvir fáa sær olju dag sum nátt. Sjálvtøkukortið fæst við at ringja tlf. 31 11 33 og spyrja eftir Oddvør, ið hevur hesa kortavgreiðslu um hendi.

Oljuráðgevin Suni á Dalbø er farin úr starvi, og Suður-Vestur Samtakið er upployst. Hann hevur saman við øðrum stovna oljuráðgevarafelagið North Atlantic Provider p/f, har hann er settur stjóri. Partafelagið legði lunnar undir virksemi sítt 01.10.98 við skrivstovu í Sandavági og í Havn. Í Sandavági eru tvey starvsfólk og í Havn eitt.

Broyttar upplatingartíðir á ruskplássinum úti í grótbrotinum. Frá 01.01.99 verður opið soleiðis:

týsdag 17 - 18, mikudag 17 - 18, friggjadag 17 - 19, leygardag 17 - 18.

Fólkatalið kvinkar spakuliga uppeftir frá 886 við ársenda í fjør til 898 fólk tann 22.12.98. Tað eru fødd 11 børn í árinum, meðan sama tíðarskeið eru 16 fólk farin í kirkjugarðin og tann 17. er jarðaður í aðrari bygd.

| ár | mannf. | konuf. | íalt |
|---|---|---|---|
| 0 | 6 | 5 | 11 |
| 1 | 7 | 3 | 10 |
| 2 | 5 | 7 | 12 |
| 3 | 3 | 10 | 13 |
| 4 | 5 | 4 | 9 |
| 5 | 9 | 2 | 11 |
| 6 | 4 | 9 | 13 |
| 7 | 8 | 5 | 13 |
| 8 | 7 | 13 | 20 |
| 9 | 12 | 11 | 23 |
| 10 | 7 | 6 | 13 |
| 11 | 5 | 6 | 11 |
| 12 | 8 | 8 | 16 |
| 13 | 8 | 6 | 14 |
| 14 | 8 | 7 | 15 |
| 15 | 7 | 3 | 10 |
| 16 | 5 | 2 | 7 |
| 17 | 9 | 6 | 15 |
| 18 | 8 | 2 | 10 |
| 19 | 9 | 6 | 15 |
| 20 | 11 | 1 | 12 |
| 21 | 3 | 5 | 8 |
| 22 | 6 | 3 | 9 |
| 23 | 7 | 5 | 12 |
| 24 | 3 | 2 | 5 |
| 25 | 7 | 2 | 9 |
| 26 | 6 | 5 | 11 |
| 27 | 4 | 2 | 6 |
| 28 | 6 | 6 | 12 |
| 29 | 8 | 5 | 13 |
| 30 | 5 | 4 | 9 |
| 31 | 6 | 2 | 8 |
| 32 | 11 | 9 | 20 |
| 33 | 2 | 7 | 9 |
| 34 | 9 | 3 | 12 |
| 35 | 11 | 4 | 15 |
| 36 | 10 | 5 | 15 |
| 37 | 1 | 6 | 7 |
| 38 | 12 | 5 | 17 |
| 39 | 7 | 6 | 13 |
| 40 | 4 | 5 | 9 |
| 41 | 4 | 5 | 9 |
| 42 | 5 | 4 | 9 |
| 43 | 5 | 4 | 9 |
| 44 | 7 | 3 | 10 |
| 45 | 7 | 3 | 10 |
| 46 | 7 | 4 | 11 |
| 47 | 7 | 2 | 9 |
| 48 | 10 | 6 | 16 |
| 49 | 7 | 12 | 19 |
| 50 | 3 | 12 | 15 |
| 51 | 8 | 4 | 12 |
| 52 | 6 | 6 | 12 |
| 53 | 8 | 2 | 10 |
| 54 | 7 | 8 | 15 |
| 55 | 5 | 12 | 17 |
| 56 | 4 | 5 | 9 |
| 57 | 8 | 3 | 11 |
| 58 | 6 | 5 | 11 |
| 59 | 7 | 4 | 11 |
| 60 | 5 | 2 | 7 |
| 61 | 9 | 3 | 12 |
| 62 | 1 | 3 | 4 |
| 63 | 4 | 3 | 7 |
| 64 | 1 | 4 | 5 |
| 65 | 1 | 1 | 2 |
| 66 | 0 | 2 | 2 |
| 67 | 3 | 2 | 5 |
| 68 | 6 | 3 | 9 |
| 69 | 3 | 6 | 9 |
| 70 | 4 | 5 | 9 |
| 71 | 7 | 3 | 10 |
| 72 | 4 | 10 | 14 |
| 73 | 1 | 5 | 6 |
| 74 | 2 | 4 | 6 |
| 75 | 1 | 4 | 5 |
| 76 | 2 | 6 | 8 |
| 77 | 2 | 3 | 5 |
| 78 | 7 | 7 | 14 |
| 79 | 3 | 3 | 6 |
| 80 | 2 | 4 | 6 |
| 81 | 5 | 3 | 8 |
| 82 | 0 | 4 | 4 |
| 83 | 1 | 3 | 4 |
| 84 | 2 | 1 | 3 |
| 85 | 0 | 2 | 2 |
| 86 | 1 | 1 | 2 |
| 87 | 1 | 0 | 1 |
| 88 | 1 | 0 | 1 |
| 89 | 0 | 0 | 0 |
| 90 | 2 | 1 | 3 |
| 91 | 1 | 1 | 2 |
| 92 | 0 | 0 | 0 |
| 93 | 0 | 0 | 0 |
| 94 | 0 | 0 | 0 |
| 95 | 0 | 0 | 0 |
| 96 | 0 | 0 | 0 |
| 97 | 0 | 0 | 0 |
| 98 | 0 | 0 | 0 |
| 99 | 0 | 0 | 0 |
| 100 | 0 | 0 | 0 |
| | 482 | 416 | 898 |

Nú er so spakuliga komið gongd á vegarbeiði hjá okkum. Í ár er asfalterað uppi á Mýrum 326 m à 9 metra breidd - ialt 2934 $m^2$, og á Útriðingsvegnum er asfalterað 140 m à 5 m breidd og 250 m à 9 metra breidd - ialt 2950 $m^2$. Næsta ár verður hildið áfram við vegarbeiði, og tá verður tað Suðurtriðingsvegurin, sum verður høvuðsarbeiði okkara.

Arbeiðið við SEV-linju, tlf, vatni og kloakk út eftir Ovara vegi bleiv eitt sindur drúgvari, enn vit væntaðu, men hetta arbeiði heldur á og verður gjørt liðugt. Eitt strekki av høvuðsvatnleiðingini út á Bakka uppá góðar 200 metrar frá Geilini og nakað út um Selvíkarrættina er eftir at leggja niður, og hetta verður eisini gjørt í komandi ári, og tá tað er liðugt, hevur stórt sæð øll bygdin uttanfyri Stórá fingið nýggja vatnleiðing og eru íbundin kloakkskipan, sum er førd á sjógv.

Jákup og Poul Arni, sum í fleiri ár hava verið í føstum arbeiði hjá Sørvágs kommunu, fara frá 01.01.99 undir at reka sítt egna ráðgevaravirki WestTec, og kommunan fer tí í framtíðini at keypa tær tænastur henni nýtist frá fyritøku teirra. WestTec fer at leiga hølir frá Sørvágs kommunu (húsini hjá Lovísu), og hagar verður flutt einaferð í januar mánað.

Tað verður mint á, at tað er strangliga bannað at sópa (tøð) út í áir og vøtn/sjógv og á bø millum hús. Brot á hesa reglugerð viðførir sekt. Tey, ið ikki hava stykkir at breiða á, fáa loyvi at breiða tøðini út á norðara dumpinum norðuri á Mýrum.






# Sørvágs Kommuna * Fíggjarætlan 1999

Samtykt **26.11.1998**

| 1995 | | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 73.000.000 | Skattskydug inntøka: | 71.500.000 | 84.054.000 | 89.816.255 | 90.500.000 | |
| 23% | Skattaprosent: | 21% | 21,3% | 21,3% | 21,25% | (kirkjuskt.írokn) |
| 2.500 | Barnafrádráttur: | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | |
| 0.05% | Kirkjuskattur: | 0,25 | 0,25 | 0,25 | 0,25% | |

| Roknskap.: 1995 | | Roknskap.: 1996 | Bóka 31.12 1997 | Framrokna 1998 | Fíggjarætlan: 1999 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **RAKSTUR:** | | | | |
| 47.544 | 1000. Byggibúning | 18.004 | 27.223 | 47.462 | 115.000 |
| 139.622 | 2000. Kommunal virkir | 55.883 | 467.388 | 593.700 | 310.400 |
| 1.707.773 | 3000. Teknisk mál | 1.784.025 | 2.293.359 | 2.003.000 | 2.463.000 |
| 2.084.384 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 1.929.382 | 1.994.249 | 2.121.030 | 2.308.000 |
| 2.059.030 | 5000. Almanna- og heilsumál | 2.362.473 | 2.288.633 | 2.572.100 | 2.885.616 |
| 1.102.580 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 1.230.045 | 1.384.410 | 1.351.350 | 1.234.100 |
| 7.140.934 | A. RAKSTUR SAMANLAGT | 7.379.812 | 8.455.262 | 8.688.642 | 9.316.116 |
| | **ÍLØGUR:** | | | | |
| 21.885 | 1000. Byggibúning | 16.618 | 2.876 | 427.000 | 358.000 |
| 72.726 | 2000. Kommunal virkir | 182.019 | 522.010 | 770.000 | 726.000 |
| 320.423 | 3000. Teknisk mál | 316.924 | 238.946 | 1.170.400 | 1.300.000 |
| 57.793 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 95.498 | 161.538 | 290.690 | 165.000 |
| 0 | 5000. Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 42.344 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 52.518 | 34.650 | 10.000 | 0 |
| **515.171** | **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **663.576** | **960.020** | **2.668.090** | **2.549.000** |
| **7.656.105** | **RAKSTUR & ÍLØGUR** | **8.043.388** | **9.415.282** | **11.356.732** | **11.865.116** |
| | 62500. REGULERINGSKONTO R/Í | | | 0 | ***572.767*** |
| | | | | 11.356.732 | ***12.437.883*** |
| **3.390.334** | **C. RENTUR** | **1.932.303** | **1.569.631** | **1.540.705** | **1.322.396** |
| | **FÍGGJARBROYTINGAR:** | | | | |
| 1.753.522 | Goldin veðhald | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 649.931 | Goldi í kreppulánsgrunn | 705.570 | 807.589 | 0 | 0 |
| 997.587 | Øking av likvidum | 2.032.481 | 3.459.924 | 698.528 | 0 |
| 564.442 | Aðrar fíggjarbroytingar | 1.008.368 | -490.877 | -347.436 | 0 |
| **3.965.482** | **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | **3.746.420** | **3.776.635** | **351.092** | **0** |
| 713.976 | Avdráttur | 1.242.408 | 1.494.505 | 1.241.349 | 913.856 |
| 0 | Eykaavdráttur | 0 | 0 | 2.000.000 | 2.500.000 |
| **713.976** | **E. AVDRÁTTUR AV LÁNUM:** | **1.242.408** | **1.494.505** | **3.241.349** | **3.413.856** |
| **15.725.897** | **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT:** | **14.964.519** | **16.256.053** | **16.489.878** | **17.174.135** |
| | **INNTØKUR:** | | | | |
| 0 | Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 | 0 |
| -1.753.522 | Lántøka | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | Minking av likvidum | 0 | 0 | 0 | -812.654 |
| -33.093 | Avdráttur av útlánum | -37.290 | 58.766 | -47.348 | -60.000 |
| -13.939.282 | Skattainntøka (netto) | -14.927.227 | -16.314.820 | -16.442.530 | -16.301.481 |
| **-15.725.897** | **F. FÍGGJAN SAMANLAGT** | **-14.964.517** | **-16.256.053** | **-16.489.878** | **-17.174.135** |
| 0 | Javnvág | 2 | 0 | 0 | 0 |
| **-2.892.843** | **ÚRSLIT áðrenn avdrátt:** | **-4.951.535** | **-5.329.907** | **-3.545.093** | **-2.541.202** |

| Roknskap: 1995 | Ársúrslit: | Roknskap: 1996 | Bóka 31.12. 1997 | Bóka 15.09 1998 | Fíggjarætlan: 1999 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Skuld:** | | | | |
| 8.269.624 | Føroya banki | 7.843.767 | 7.375.206 | 6.426.206 | 5.592.466 |
| 9.486.102 | Tryggingarstovnar | 9.417.255 | 9.417.254 | 8.808.239 | 7.780.922 |
| 95.809 | Kommunukredit | 95.809 | 95.809 | 89.613 | 77.987 |
| 16.028.017 | Nykredit | 15.207.046 | 14.301.161 | 12.534.023 | 10.907.851 |
| 92.723 | Onnur lán | 19.104 | 0 | 0 | 0 |
| **33.972.275** | **Lán íalt** | **32.582.981** | **31.189.431** | **27.858.082** | **24.359.226** |
| 1.200.000 | Veðhald | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 0 | Ognarar | 25.115 | 26.121 | 20.386 | 20.386 |
| 1.433.038 | Millumrokningar | 1.481.361 | 1.986.361 | 273.585 | 273.585 |
| **36.605.313** | **Skuld íalt** | **34.139.457** | **33.251.912** | **28.202.052** | **24.703.196** |
| 2.663.275 | Tøkur peningur | 4.695.756 | 8.155.680 | 8.847.210 | 8.034.556 |
| 1.269.329 | Kreppulánsgrunnur | 1.974.899 | 2.782.488 | 2.782.488 | 2.782.488 |
| 544.437 | Skuldarar | 1.675.740 | 1.447.154 | 1.361.145 | 1.361.145 |
| 327.273 | Millumrokningar | 517.436 | 621.465 | 258.053 | 258.053 |
| 1.595.104 | Útlán | 1.557.814 | 1.616.580 | 1.569.232 | 1.509.232 |
| **6.399.419** | **Ogn íalt** | **10.421.645** | **14.623.367** | **14.818.128** | **13.945.474** |
| **30.205.895** | NETTOSKULD | **23.717.812** | **18.628.545** | **13.383.924** | **10.757.722** |

Hetta var so ein roynd við orðum og tølum at kunna tykkum eitt sindur, og so verður hvør einstakur sjálvur at gera av, hvussu hevur vígnast, men er tað nakar, ið saknar ella ynskir meira vitan av almennum áhuga, ber til at venda sær til skrivstovuna.

Til seinast ynskja vit øllum bygdarfólkunum eitt gott, friðsælt og eydnuberandi nýggjár í vónini um eina ljósa framtíð fyri bygd okkara.

Sørvágur tann 30.12.98

SØRVÁGS KOMMUNA

Petur Kruse

Petur Kruse, formaður